TILTØK

Katólska kirkjan
Leygardagin kl. 11.30: Messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 11.00: Hámessa við Jacque Adams í Mariukirkjuni.

Meinigheitshúsið
Sunnukvøldið kl. 18.00: Møti v/ Derhard Olsen.

Ebenezer
Í kvøld kl. 20.00: Ungdómsmøti.
Sunnudagin:
kl. 10.00: Breyðbróting,
kl. 18.00: Evangeliskt møti,
kl. 21.00: Útimøti.
Heimasíðan:
www.ebenezer.fo

Filadelfia, Landavegur 22
Í kvøld kl. 21.00: Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 17.00: Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 18.00: Kvøldmøti v/ Rúna Rasmussen, kl. 22.00: Útimøti v/ Samkomuni í Hoyvík.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo http://www.filadelfia.fo

Hvítusunnusamkoman
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

Samkoman Immanuel
Í kvøld kl. 20.00: Kongsins Herlið. 8 ár og eldri eru vælkomin.

Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin í Hoyvíkar skúla: Kl. 17.30 børn og kl. 18.00 møti. Kl. 22.00 verður útimøti á Vaglinum. Til bæði møtini verður luttøka við okkara summargestum úr Norra, Rúnu og Heðin. Øll eru vælkomin.

Saron, Vestmanna
Sunnudagin kl. 18.00: Møti v/ fríum vitnisburði. Mánakvøldið kl. 20.00: Bibliu- og bønarmøti.

Skála meinigheitshús
Sunnukvøldið kl. 19.00 verður útimøti á økinum hjá Sparikassanum við luttøku av Jóannes Fonsdal, Magna Christiansen og øðrum. Aftaná verður drekka og sangløta í meinigheitshúsinum. Innsavnan verður til húsið. Hjartaliga vælkomin.

Keldan í Skálafirði
Í kvøld kl. 20.30: Vón fyri framman, við hugna, vitnisburði og sangi. Jónhilda og Gullak Hansen luttaka.
Leygarkvøldið kl. 21.00: Opið hús.
Sunnukvøldið kl. 19.00: Møti v/ Paula Høj. Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

Café One Way, Tvøroyri
Fríggjakvøldið 3. aug. kl. 21.00: Ungdómstreff. »Hvat er frelsa«? Hvør? Hvussu? Hví? Tit spyrja – vit svara.
Leygarkvøldið 4. aug. kl. 21.00: Útifundur. Caféin er opin.
Sunnukvøldið 5. aug. kl. 21.00: Filmur verður vístur. Nógvur góður tónleikur.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Sunnukvøldið kl. 18.00: Møti við Katrin. Innsavnan verður til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Frelsunarherurin, Vági
Sunnudagin kl. 18.00: Møti v/ Jens Vestergaard og Eingrím Holm. Øll eru vælkomin.

Missiónshúsið í Vági
Møti verður sunnukvøldið kl. 18.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Eysturoyar Gongufelag/kunningarstova
Gongutúrur verður sunnudagin 5. aug. Gingið verður frá Saksun, eftir bygdagøtuni til Tjørnuvíkar. Túrurin er miðal/tungur. Vit møtast í Tjørnuvík kl. 14.00, har bussur koyrir okkum til Saksunar.

Lymfødemfelagið
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 13-15.00 á tlf. 212380.

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Frá 3. juli til 17. august er Tilhaldið opið mánadag-fríggjadag kl. 14.00-18.00. Framsýningin av listaverkunum hjá Fridtjoffi Joensen er opin til og við 3. august frá kl. 14.00–18.00. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.

AA-fundir í Havn
Reinsaríið, Tórsgøta 5: Fundir verða í kvøld kl. 20–21.00 og kl. 22.30–23.30.

Al-anon
fundur er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 á Vaskarínum í Tórsgøtu 5.

AA-fundir í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

Føroya Heimavirkisfelag
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304

Spælistovan í Meinigheitshúsinum í Havn
hevur summarfrí frá 28.6. til 3.9.

LFÚ-skrivstovan
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 13 og 17. LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

LISA
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin mánadag kl. 14-18 og hósdag kl. 14-20. Teldupostur lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

Amnesty International, Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin: Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

MBF
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 9.00 og 16.00. Vit hava stongt vegna summarfrí frá 5. juli til 15. august. Tlf. 317373 · Fax 310813
e-mail: mbf@post.olivant.fo

Giktafelag Føroya
Skrivstovan er stongd í summarfrítíðini. Lýst verður tá opið verður aftur.

Javni
Skrivstovan er stongd vegna summarfrí. Ringjast kann til ein av nevndarlimunum.
Eirikur Dam, tlf. 422087
Jógvan Elias á Løgmansbø, tlf. 317686
Jarvin Feilberg Hansen, tlf. 320237
Malena Arnholdsdóttir, tlf. 441395
Diana í Puntabyrgi, tlf. 316510 – fax 310557
email: punta@post.olivant.fo

Felagið Føroyar-Kuba
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur: far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

Deyvafelag Føroya
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.-olivant.fo heimasíðan: www.deaf.fo

Føroya Astma/Allergifelag
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c, Tlf./fax 311419

Cøliakifelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664 Beinta tlf. 310574 Henning tlf. 314783.

Nýrafelagið
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail: thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 315673, Katrin

Føroya Felag Móti Krabbameini
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15.
Tlf. 31 79 59,
telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

Evangeliska Røddin, Odense
Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

Føroyahúsið í Føroyska sendingin »v/ Betesdabrunnin«
er at hoyra á FM 92,2 MHZ miðbýurin, FM 106,5 MHZ Aalborg suður, og FM 107,4 Aalborg norður, hvønn leygardag kl. 10 og verður endursend sunnukvøld kl. 20.30.

Malta, Hirtshals
Sunnudag: Kl. 11: Breyðbróting. Kl. 18: Evangeliskur fundur. Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

BRÚDLEYP

Í dag, 3. august, kl. 16.00 giftast í Býráðshúsinum í Klaksvík, Vivi Heinesen og Árni Elttør, bæði úr Klaksvík. Veitslan verður í Skálanum kl. 19.00 fyri innbodnum og vælkomst kl. 21.30.

Leygardagin 4. august kl. 17.00 giftast í dómkirkjuni Gunnvá Guttesen og Mikael Harald Viderø, Argir. Veitslan verður fyri innbodnum í skúlanum í Hoydølum kl. 19.00.

Leygardagin 4. august kl. 15.00 giftast í Sjóvar kirkju Karina Simonsen, Strendur, og Svend Højgaard, Skála. Brúdleypið verður í høllini á Skála kl. 19.00.

Leygardagin 4. august giftast í Sørup kirkju í Svendborg Anne Holten og Christian Mortensen (sonur Lisbeth og Tummas Juul Mortensen, Tórshavn). Brúdleypsadressan: co. Helle Holten, Nyvej 30, 5792 V. Skjerninge.

Leygardagin 4. august giftast í Holme Kirke Birgitta Just Mittún, Saltangará, og Søren Aldenryd, Århus. Brúdleypsadressa: Chr. Christensensvej 8, Kysing 8300 Odder.

Leygardagin 4. august kl. 14.00 giftast í Sandavágs kirkju Una Jacobsen úr Miðvági og Torstein Á Steig úr Sandavági. Bæði búsitandi í Viby J. Opið hús verður Norðuri í Heiðum í Miðvági kl. 20.00.

Leygardagin 4. august kl. 09.00 giftast í Ebenezer Ruth Skarðenni, Argir, og Petur Hansen, Leirvík. Veitsla verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum.

90 ÁR

Í dag, 3. august, verður Jóhanna Joensen, Norðskála, 90 ár. Hon er at hitta í heiminum hjá sær frá kl. 15.00–18.00.

85 ÁR

Í dag, 3. august, fyllir Brynhild Absalonsen, Klaksvík, 85 ár. Føðingardagin er hon at hitta frá kl. 16.00 hjá dóttrini Elsu, Hanusargøta 9, Tórshavn.

FILMSTEIGURIN

Save the Last Dance

Tá studentaskúlanæmingurin, Sara, verður boðin við á diskotekið Stepps, verður tað samstundis ein nýggjur heimur, sum hon leitar inn í.

Hon er so at siga einasta hvíta andlitið í stóru rúgvuni, og hetta er fyrstu ferð, at hon upplivir hip-hop dans og tónleik.

Hip-hop var ikki væl dámt, tá hon búði í ein vælbjargaðum forstaði saman við mammu síni. Tá gekk hon hinvegin til ballet, men balettskógvarnir vóru lagdir á hillina, tá mamman doyði.

Nú er Sara flutt til pápa sín, sum býr í Chicago, og nú gongur hon á einum studentaskúla, har tað mest sum bara eru myrkir næmingar.

Umvegis tónelikin og dansin fær hon nýggjar vinir, og serliga Derek og systur hansara, Chenille, gerast góð vinfólk. Saman við Derek fer Sara at gera meira við nýggjan dans, og teir gerast skjótt eitt nógv umtalað par – bæði á dansigólvinum og í tí privata.

Men umhvørvi og fordómarnir sleppur eingin av við, og tað líða tey bæði undir.

Høvuðsleiklutirnar í filminum hava Julia Stiles og Sean Patrick Thomas.

Heartbreakers

Max er ein eggjandi og dragandi kvinna, sum menn plaga at falla fyri. Hon er samstundis snild og giftir seg við ríkum monnum, sum hon seinni letur seg skilja frá. Eftir stendur hon so við einum stórum peningaposa.

Fyri at fáa møguleikan at skilja seg frá monnunum, hevur Max brúk fyri einum hjálparfólki, og tað er sjálvandi ein líka so dragandi kvinna, sum kann seta menninar í keðiligar støður, sum síðani kosta teimum giftarmálið og nógvar pengar.

Tann, sum hjálpir Max við at fella menninar, er hennara egna dóttir, Page.

Tær báðar hava gott samstarv, men tað tær eru í holt við at snýta sigarkongin, William B. Tensy, gongur ikki eftir vild, tí Page hittir ein ungan mann, hon verður forelskað í. Alt í einum er tað hent, sum ikki má henda. Kenslurnar eru komnar við í spælið, og so er ikki so lætt, at fáa ætlanina at rigga.

Í leiklutinum sum Max sæst Sigourney Weaver, meðan dóttir hennara verður spæld av Jennifer Love Hewitt. Aðrir leikarar í filminum eru Gene Hackman, Jason Lee og Ray Liotta.

Frumsýning
Fríggjadagin 03.08. kl. 19[00] Fríggjadagin 03.08. kl. 23[30]
Leygardagin 04.08. kl. 19[00] Leygardagin 04.08. kl. 23[30]
Sunnudagin 05.08. kl. 22[15]

☆ BIO KIOSKIN ☆
Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm is - o.m.a.

HAVNAR BIO
☆ Tlf. 3119 56 ☆

Frumsýning
Fríggjadagin 03.08. kl. 23[15] Leygardagin 04.08. kl. 23[15]
Sunnudagin 05.08. kl. 21[45]

www.in.fo/havnarbio

Fríggjadagin 03.08. kl. 18[45] Fríggjadagin 03.08. kl. 21[00]
Leygardagin 04.08. kl. 18[45] Leygardagin 04.08. kl. 21[00]
Sunnudagin 05.08. kl. 19[30]

Fríggjadagin 03.08. kl. 21[15] Leygardagin 04.08. kl. 21[15]
Sunnudagin 05.08. kl. 20[00]

KOMANDI FILMUR

Frumsýning Fríggjadagin 10.08.